VALGREINAR

Arbeiðsloysið í Suðuroyar sunnaru helvt skal á dagsskránna

Johan Dahl
løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Aðalmálið hjá teimum sum verða val á Løgting fyri Suðuroynna skal og má verða at fáa sett gongd aftur í gamla flakavirkið og vinnuvirksemið í Vági.

Tað má verða eitt krav bæði frá kommunalpolitiskari síðu og frá landspolitiskari síðu at ein varandi loysn verður funnin , antin saman við Fiskavirking, har teir fara undir framleiðslu, sum kann geva arbeiðsfólkinum ið verða send heim nú í næstum av Suðurlaks vissu fyri at arbeiði verður aftur skjótast møguligt - støðugt arbeiði, ella má virkið seljast/leigast til aðrar lokalar kreftir sum hava viljan og treystið af fáa virkið at koyra optimalt.

Onki menniskja, kann halda út at livað í óvissu og ótryggleika fyri, um tey hava til dagin og vegin í morgin, næstu viku ella næsta mánað.

Vágur og sunnara helvt av Suðuroynni, hevur nú í skjótt 12 ár havt sera óstøðugt virksemið og nú tað má ongantíð ov skjótt fáast ein loysn á hesi óuthaldiligu støðu fyri fólki á staðnum.

Allar góðar kreftir mugu takað saman hendur og í samstarvið finnað røttu haldbaru loysnina.

Miðflokkurin segði nei til at blokkurin skuldi skerjast við kr. 367 milliónum (3)

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Í seinastu grein míni hesum viðvíkjandi nevndi eg, at MIÐFLOKKURIN var ímóti at blokkurin skuldi skerjast, og MIÐFLOKKURIN vildi hava hetta mál út til fólkaatkvøðu.

At vit í Føroyum í dag hava ein skerdan blokk ,uttan at vit hava havt eina fíggjarliga uppgerð millum Føroyar og Danmark, er MIÐFLOKKURIN ikki glaður fyri. Tí hví skulu vit geva pengar til Danmarkar, sum vit eftir øllum at døma eiga frammanundan. Hugsa um tað strategisku støðu, Føroyar hava í NATO samanhangi, hugsa um hví Danmark ikki er komið uppá somu upphædd í % sum onnur lond í NATOsamanhangi, hvat er tað teir fáa fyrimunir av, jú Føroyum og Grønlandi. Hygg bara eftir hvussu nógvar pengar teir hava spart í árunum 1976 - 1989, uppá at teir hava havt Føroyar og Grønland sum "strategisk plaseraði hjálond" og vunnið sær fyrimunir av hesum. Hetta stafesta eisini kendir fyrrverandi Danskir politikarar á skrift.

Vel tí MIÐFLOKKIN sum tína rødd á Løgtingi. Borgan fyri vælferð , trivnaði og trygd.

Hesum vil eg arbeiða fyri

Arni Abrahamsen
valevni Miðfloksins í Eysturoy

Sum politiskt umboð fyri Miðflokkinum vil eg arbeiða fyri:

- At vinnulívið framhaldandi hevur góðar umstøður í samfelagnum, og at partafelagsskatturin verður varðveittur á einum lágum støðið.
- At tað almenna fer ein meira virknan ívirksetarapolitik, og er við til at stuðla uppundir ívirksetarar, og at TK-stovan verður varðveitt og ment.
- At støða verður tikin til, hvussu vit skulu arbeiða fram ímóti at privatisera almenn partafeløg, og hvussu hetta skal fremjast.
- At ein langtíðar ætlan verður løgd fyri pensjónsviðurskiftunum í samfelagnum, og hvussu hesi viðurskifti skulu síggja út í framtíðini.
- At umhvørvið kemur á dagsskránna, og íbirta eitt alment kjak um, hvussu vit á bestan hátt varðveita okkara umhvørvið.
- At familjan fær best møguligu kor í samfelagnum, og at hjúnabandið verður varðveitt sum einsti lóggildaður samlívsformur.
- At ungdómur framhaldandi fær góð kor at nema sær útbúgving, bæði í Føroyum og uttanlanda.
- At meira verður gjørt fyri at upplýsa serliga ungum um vandan av rúsdrekka og rúsevnismiðsnýtslu.
- At betra um granskingarmøguleikarnar í Føroyum. Tað verið seg bæði innan tekniska gransking og biologiska gransking, men talan kann einans vera um etiskt forsvarliga gransking.
- At andaligt virksemið fær bestu kor í samfelagnum, og at samfelagið framhaldandi viðurkennir tann týdning, sjálvbodna kristiliga arbeiðið hevur fyri samfelagið og trivnaðin í samfelagnum.
- At samfelagið enn meir gerst eitt samfelag fyri øll.
- At valskrá Miðfloksins verður framd í verkið.

Les meira á heima.olivant.fo/~arnia

Eg vil hervið ynskja øllum føroyingum eitt gott val. Setið X við lista H.

Tey veiku í samfelagnum eru ofraði, tí ríkisveitingin bleiv minkað

Høgni Mikkelsen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Hetta er ein ræðandi yvirskrift, men tann beiski veruleiki.

Ríkisveitingin er minkað við heili 366 mill. kr, og grundin til hetta er, eftir mínari meining, ein bittur stoltleiki! Vit skulu klára okkum sjálvi, kosta hvat tað kosta vil, siga tríggir flokkar á tingi.

Tað er tíverri nógv eldri fólk sum ikki klára seg sjálvi í tí dagliga, og eru tí noydd at hava fólk um seg alla tíðina. Sum oftast eru tað tey nærmastu sum taka hesa ábyrgd á seg og tí forsóma arbeiði, ella í ringasta føri siga arbeiði frá sær.

Fyri 366 mill. kr. kundu nógv ellis- og røktarheim veri bygd, umframt stovnar til tey brekaðu sum eisini hava ein stóran íbúðartørv.

Ár teirra brekaðu var í 2003, og ikki kann sigast, at nógv er hent á hesum øki. Tað vildu Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin ikki! Teir valdu heldur at minka ríkisveitingina, og sum tey yvirskriftin sigur "tey veiku eru ofraði"

Tað rætta hevði verið at hjálpt teimum veiku fyrst, sum tey sanniliga eisini hava uppiborið.

Tit veljarar, sum hava somu meining sum eg, kunnu verða við til at tryggja eina framtíð, har tey veiku verða raðfest - seti tí krossin við Sambandsflokkin.

KOSAN-TANKERS A/S flaggar øll síni skip út til Isel of Man

Jóanis Nielsen
valevni Fólkafloksins í Vágum
www.joanisnielsen.fo



Vit eiga at gera okkara FAS-skipan nógv meira lokkandi, soleiðis at okkara grannar og onnur við kunnu síggja, at tað kundi verið ein góður møguleiki, at komi undir okkara FAS-skipan við teirra skipum.

KOSAN flaggar øll síni skip út

KOSAN, sum eitt tíðarskeið hevði eini 30 skip, hevur flaggað øll uttan 2 ella 3 skip út, tey flestu ella øll til Isel of Man, og tey seinastu fara eisini, helst í hesum árinum.

Føroyingar, sum frá byrjan hava verið við til at manna KOSAN-skipini, eru nú flest allir tíverri sagdir úr størvum sínum.

Um okkara FAS-skipan varð soleiðis, at útlendingar sóu møguleikan at koma hendan vegin, so kundi væl hugsast, at nógvir føroyingar enn høvdu størv síni í KOSAN og øðrum útlendskum reiðaríum við.

Inntøka til land okkara

Ein slík skipan hevði eisini ført kapital til land okkara - hugsast kann at hvørt skip kundi lagt eini kr.800-tús. ella upp til kr.1 mill. eftir seg, um tey koma í FAS-skipan okkara.

Sum tingmaður havi eg reist spurningin við fyrispurningum - Sjálvsagt eiga vit at fáa FAS-skipanina betur - tað kundi givið landi okkara nógvar møguleikar.

BORGAN fyri framhaldandi menning í Vágum.

X - Fólkaflokkin

VALGREINAR

Frá øllum til øll

Jørgen Niclasen
valevni Fólkaflokksins í Vágum



Tann einstaki skal hava rásarúm til sjálvur at leggja lívið til rættis eftir evnum og dugnaskapi.

Fólkaflokkurin gongur ikki inn fyri at taka pening inn frá øllum fyri síðan at deila út aftur til øll.

Øll við førleika skulu hava møguleika at klára seg sjálvi.

Harvið hava vit møguleika veruliga at hjálpa teimum, ið treingja.

520 - 0

Henrik Old
løgtingsmaður og valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy



Sambært Vinnuhúsinum eru 520 nýggj størv sett í almennu fyrisitingini síðani 1998. Av teimum eru uml. 500 sett í miðstaðarøknum.

Í sunnaru helvt av Suðuroy er einki alment starv sett hesi 6 árini. Ikki tí, økismenningarálit er prentað, so tað skuldi verið lag á manni.

Fyrstu 4 árini fullveldismenn ráddu, søgdu teir, at hetta skuldi vera fyrireikingartíð. Men so til seinasta val søgdu teir, at nú skuldu almenn arbeiðspláss flytast til Suðuroynna. Men hesi bæði árini hevur verið knívsskorið. Ikki eitt starv flutt. Minnist til, at hesi eru bestu peningaár vit hava upplivað.

Í 1992/93 fluttu vit 8 størv til Vágs í samband við sambýli á Báraldarbakka. Hetta var meðan Javnaðarflokkurin við Jóannes Eidesgaard umsat almannaøkið. Hetta var í ringastu peningatíð vit hava upplivað. Og var hetta samtíðis sum almennu arbeiðsplássini í miðstaðarøkinum fækkaðust munandi. Løgið.

500 kr. eykarokningin til sjónvarpsgjaldið frá Tjóðveldis- og Fólkaflokkinum bar væl til at flyta til Suðuroynna. Hava vit ráð at lata hesar royna einaferð enn?

Skulu vit hvørva í gloymskuni?

Lasse Klein
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Skilamaðurin W. Churchill var hittinorðaður og dugdi væl at taka til, hann segði einaferð: "Tú fært ikki atkvøður fyri tað tú hevur framt, men fyri tað tú lovar fólkið, men tú skal duga at greiða fólkið frá orsøkini til hví lyftini sviku." Hevði Sjálvstýrisflokkurin fingið atkvøður í mun til loysar uppgávur, so var hann ivaeyst størsti flokkur her á landi....... Her eru nøkur dømir:

Føroyska málið
Merkið
Útvarp Føroya
Sjónvarp Føroya
Fróðskaparsetur Føroya
Undirgrundin
Samtíðarskattaskipanin
El- skipanin
Telefonin
Undirsjóvartunnlin til Vágar
Súlan
Dúgvan
Biletmaskinurnar
Atlantic Airways
Loftferðslulógin
Samferðsluhavn á Drelnesi
Funningsvegurin
Útbyggingin av Bygdaleiðum
Sumbiartunnilin
Millumbylgjustøðin í Akrabergi
Handgarðurin í Vágum
Tyrlan
Kaldbakstunnlin
Byrgingin um Haraldsund
Stig fyri stig samráðingar við danir

Her er talan bert um lutfalsligan lítlan part av teimum málum, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur haft ábyrgdina av, og sum eru framd í samvinnu við aðrar. Skulu avrikini telja, so er eingin ivi um hvar krossurin skal setast 20. januar, men so einfalt er tað neyvan. Bert spell kunnu vit siga. Tí so kundi Sjálvstýrisflokkurin verið heilt vísir í átt fleiri umdømisvaldar tingmenn.

Fólkapensiónin má røkka til dagin og vegin

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Í dagligum tosi við fólk, ið eru komin so mikið til aldurs, at tey hava sagt vanliga arbeiðsmarknaðinum farvæl, kemur ferð eftir ferð undan kavi, at í nógvum førum er ov lítið at liva fyri.

Fólkapensiónin røkkur ikki hjá øllum, so tey klára sínar skyldur, hóast tær ikki eru av teimum størstu. Hetta er ikki nóg gott og tí eigur hetta at vera eitt mál, komandi løgting hevur frammarlaga á dagsskránni.

Tað kann ikki vera meiningin, at skattgjaldarar gjøgnum eitt heilt lív skulu venda og snara hvørjari krónu, tí landið er ov pirið við fólkapensiónini.

Hvussu skal tað fíggjast? Soleiðis hevur verið spurt mangan undir hesum valstríðnum, og sjálvandi er tað eisini ein viðkomandi og enntá avgerandi spurningur.

Tó er tað í politikki ikki bara ein spurningur um, hvussu hetta ella hatta skal fíggjast, men at vit snøgt sagt hava skyldu at syrgja fyri, at tingini virka, so brúkarin og borgarin fær gagn av teimum.

Øll hesi, ið bert hava fólkapensiónina at dúva uppá, hava so sanniliga goldið fyri seg gjøgnum eitt langt arbeiðslív. Tí er tað meiri ein spurningur um skyldu enn um fígging, tá vit skulu fáa skapt teimum virðilig kor.

Síðstu árini eru pengar søpláðir burtur í fullveldisørskapi, heldur enn at koma teimum til góðar, sum hava bygt hetta land. Her skal vend koma í!

Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri at tryggja øllum eina fólkapensión, ið tey kunnu liva av. Við tínari atkvøðu kanst tú hjálpa til, so nakað verður gjørt við fólkapensiónina!

Árinskanningar – Eiði 2.

Malan Mohr Dahl
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoynni

Vanligi føroyingurin skilir ikki, hví SEV ætlar at gera árinskanningar av Eiði 2, eftir at verkætlanin er fullførd. Neyvan verður umhvørvið ført aftur til tað upprunaliga, um árinið er so álvarsamt, at tað skaðar økið meiri, enn tað gagnar, og so fara tær milliónirnar fyri skeyti.

Her lekur millum teori og praksis, ella er her ein fjald ætlan við hesari verkætlan, tí stendur verkið fyrst uppi, verður tað ikki niðurafturlagt.

Í valskrá floksins stendur m. a. um umhvørvismál, at 1.: Munandi meiri skal gerast fyri at økja fólksins tilvitan um umhvørvis- og náttúruvernd. 2.: Tað skal vera lógarkrav, at haldgóðar árinsmetingar verða gjørdar, áðrenn farið verður til verka. Og 3.: Orkupolitikkurin eigur at byggja á orkukeldur, ið hava fyrilit fyri umhvørvinum.

Sjálvstýrisflokkurin víkur ikki frá kravinum um, at árinskanningarnar verða gjørdar, áðrenn farið verður undir Eiði 2. Tað er sunn fornuft.

Hvør kann - D kann

X fyri Sjálvstýrisflokkin: Gamal í garði - grønur í sinni.

Tað skal verða bíligari at vera pensiónistur

Meinhardt Hansen
valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum

Sambandsflokkurin ætlar sær at arbeiða fyri, at tað skal verða bíligari hjá føroyingum at búgva her í landinum.

Útrokningar vísa, at hóast fullveldissamgongan skuldi eitast at lækka skattin, so er skatta- og avgjaldstrýstið í Føroyum vaksið við fleiri prosentum seinastu árini. Hetta er fullveldispolitikkur, tá ið hann er bestur - ella ringastur.

Og tað, sum er mest skelkandi, er, at tað eru tey veiku, sum verða áløgd alt fleiri byrðar her í samfelagnum.

Tað vil Sambandsflokkurin ikki finna seg í.

Vit vilja hava ein skattareform, so at tað verða tey, sum hava breiðastu herðarnar, sum koma at bera tyngstu byrðarnar.

Burtur við ÚF og SvF

Tað líkist ongum, at eitt nú pensiónistar verða álagdir alt størri gjøld, meðan teir framhaldandi verða noyddir at klára seg við einari ov lítlari pensión.

Tí eiga pensiónistar, einkjur, einkjumenn og óarbeiðsfør fólk at sleppa undan at gjalda útvarps- og sjónvarpsgjald, sum tilsamans fer avstað við næstan 4000 krónum.

Hesi fólk eiga eisini at sleppa bíligari í sjúkrakassanum.

Tey eldru fólkini hava skapt hetta samfelagið, og vit eiga at sýna teimum neyðugu virðing og ikki áleggja teimum alt størri skatt og avgjøld.

Tað vil Sambandsflokkurin!